**Smásølumarknaðurin fyri fastnet hald – marknaður 1**

Vísandi til hoyringsskriv "Smásølumarknaðurin fyri fastnet hald – marknaður 1", vil Føroya Tele halda fast um at fartelefon er eitt substituerandi produkt í mun til PST/ISDN, og at vekslara marknaðurin ikki er ein lukkaður marknaður, men hevur fulla kapping frá útheiminum.

Fjarskiftiseftirlitið (hereftir FSE) vísir á fylgjandi:

1. Atkoman er góð (fá støð, har tað ikki ber til at fáa fastnet)
2. Netið er stabilt (sjálvdan, at ongin klártóni er)
3. Talugóðskan er høg (lítið ella onki óljóð)

Tá ið talan er um atkomu, verður víst á at VoiP, PSDT og ISDN eru eins. Her vilja vit vísa á at vit í dag hava ein dekning á farnetinum, sum er 99.8 % og vilja vit tí vísa á at atkoman á farnetinum eir eins góð og tær 3 tænasturnar FSE vísir á.

Í mun til VoiP, sum krevur eina UPS loysn, við streym slit, so hava vit á Føroya Tele UPS'ar á flest øllum GSM basustøðum, sum ger tað møguligt at samskifta uttan at SEV er tókt í fleiri tímar. Út frá hesum má sigast, at farneti er minst líka trygt sum VoiP.

Í øðrum lagi verður víst á, at farneti kann detta niður, við tá ið nógv fólk koma saman. Okkara nýggja net er uppbygt og dimensionera soleiðis at hetta ikki skal koma fyri.

Hyggja vit at tryggleikanum, so hava vit eingi tøl sum vísa at farnetið ikki hevur somu uppitíð sum PSTN, tvørtur ímóti.

Tá ið talan er um góðsku, so er okkara uppáhald at vit um stutta tíð vilja síggja VoLTE sum eina loysn, sum er fult so trygg og hevur nógv betur talu góðsku enn hana vit kenna frá PST/ISDN. Føroya Tele gjørt íløgur fyri omanfyri 100 mill DKK fyri at tryggja millum annað ein slík tænasta skal kunna gerast møgulig.

**FSE**

*VoIP[18]. Um onkur fer at bjóða út un-managed VoIP við føroyskum telefonnumrum, kann Fjarskiftiseftirlitið gera eina nýggja meting av, hvørt un-managed VoIP hald skulu takast við í marknað 1.*

**Viðmerkingar**

Hetta er longu galdandi tí Betri Banki nýtir "Skype for business" sum teirra telefoni loysn

**FSE**

*Tá eitt VoIP samband er "managed", er tað gjørt til at tryggja tænastustøðið, QoS[16], eitt nú við at ljóðpakkarnir verða sendir út við hægri prioriteti enn aðrir dátapakkar, soleiðis at teir koma fram til tíðina uttan mun til hvussu nógv dátuferðsla er á netinum, og/ella við at ein ávísur partur av bandbreiddini verður reservera til talu.*

Tað er upp til kundan at velja QoS til ella ikki, vit hava fleir kundar sum ikki hava keypt QoS sum tænastu.

**FSE**

*Tá eitt VoIP samband er "un-managed", verður ferðslan send uttan at ljóð-pakkarnir hava fingið reservera sína egnu bandbreidd, ella hava fingið prioritet fram um aðra dátuferðslu. Un-managed VoIP hevur tí møguleikar fyri IP-konfliktum, sum kunnu leggja VoIP lamið ella darva talugóðskuni. Tað er torførari at finna og harvið rætta feilir og fáa sambandið aftur, um netið er un-managed. Viðvíkjandi talugóðsku, so er vandi fyri seinkaðum signali (signalið er ikki real-tíð)[13], og fyri at ljóðið blívur burtur við hvørt[17], um nógv ferðsla er á netinum.*

Hetta er ikki rætt. Við at keypa ein SIP Trunk ella eina ISDN boks, kanst tú uttan trupulleikar nýta "Skype for business" sum er eitt fult út kappingarført alternativ til okkara VoiP tænastu. Av kundum sum hava hesa loysn kunnu vit nevna Betri Banka.

Hetta er eisini í trá við tað sum Microsoft førir fram:

https://technet.microsoft.com/en-us/library/gg398619.aspx

eg siteri:

*"A SIP trunk is an IP connection that establishes a SIP communications link between your organization and an Internet telephony service provider (ITSP) beyond your firewall. Typically, a SIP trunk is used to connect your organization's central site to an ITSP. In some cases, you may also opt to use SIP trunking to connect your branch site to an ITSP"*

Umframt mest útbreiddu loysnina hjá Microsoft, finnast tað eitt hava av líknandi loysnum.

Vodafone í Íslandi selur eisini eina buntaða Office 365 og Skype for Business skipan:

https://vodafone.is/fyrirtaeki/lausnir/fastlina-fyrir-fyrirtaeki/one-net-business/

Út frá hesum er einki at ivast í at kappingin frá Microsoft og øðrum veitarum er fult virkandi og er vekslara marknaðurin tí ikki ein lukkaður marknaður.

**FSE**
*Hóast fartelefoni á mangan hátt líkist PSTN (ella ISDN og VoIP), so eru tó eisini fleiri munir sum gera, at Fjarskiftiseftirlitið ikki metir, at fartelefoni er substituerbar við PSTN.*

**Viðmerking**
Vodafone hevur í fleiri ár selt eina GSM vekslara skipan til vinnukundar, so tí vilja vit halda fast um at hetta ikki er galdandi. Umframt tað, so hava bæði Vodafone og Føroya Tele seinastu 2 árini gjørt sera stórar íløgur í GSM LTE farneti, sum gera tað minst líka trygt at nýta sum fastnet. Í nærmastu framtíð vilja vit eisini síggja VoLTE loysnir á marknaðinum, sum koma at gera talu góðskuna væl betur enn vit kenna hana í dag við eini PSTN loysn.

**FSE**
*Við árslok 2015 minkaði talið av fartelefoni haldum fyri fyrstu ferð. Stórur partur av hesi minking var orsakað av broyting í uppgerðini, so hon nú samsvarar við ITU leiðreglurnar. M.a. verða dedikeraði mobil breiðbandshald og telemetrihald ikki longur tald við. Hald sum hava verið óvirkin í meir enn 3 mánaðir telja heldur ikki longur við. Áður var markið 6 mánaðir. Ein onnur orsøk til minkingina er, at veitararnir hava broytt haldini og harvið helst rudda út í haldum.*

**Viðmerking**

Størsta orsøkin til minkingina í haldinum er at vinnufyritøkur lata starvsfólk nýta sína fartelefon sum sína egnu, hetta orsaka av nýggja flate rate prísstrukturinum hjá bæði Føroya Tele og Vodafone. Størsta broytingin í atburðinum hjá kundum kom tó tá reglurnar um skatting av fartelefonum varð broytt. Síðan starvsfólk nærum ikki verða skattað av fartelefonum, sum hesi hava frá arbeiðsgevaranum hava hesi valt sína persónliga fartelefon frá og fleiri velja eisini borðtelefonirnar frá. Hettar merkir eisini at nógv tær flestu samrøðurnar fara beinleiðis millum fartelefonir og tí er týdningurin av umstillingsborðinum í TotalView alsamt minkandi, tá hesar ikki koma umvegis umstillingsborðið longur.

Hetta stuðlar eisini undir argumentatiónini um at farneti er eitt substutiuterandi produkt til PSTN/ISDN/VoiP.

**FSE**

*Føroya Tele hevur integrera TotalView við fleiri vekslaraskipanir, herundir Broadworks, sum er ein hýst vekslaraskipan, ið Føroya Tele umvegis FT Samskifti selur undir navninum NetTala. Síða 14, Fastnet hald - marknaður 1*

**Viðmerking**

Í hoyringsskrivinum verður lagt upp til at TotalView og NetTala (BroadSoft) hjá Føroya Tele verður selt saman. Hetta er ein misskiljing! Formula tekur sær av søluni av TotalView og Føroya Tele tekur sær av at selja NetTalu tvs. talan er um tvær ymiskar søludeildir og hesar geva ikki tilboð fyri hvørja aðra. Orsøkin til hettar býtið er tann sannroynd at Føroya Tele ikki eigur 100% av Formula. Fyri at verja hinir partaeigararnar í Formula, soleiðis at tað ikki er gjørligt at profit makismera vinning hjá Føroya Tele við at flyta vinning frá Formula yvir í Føroya Tele td. við at slaka uppá prísin av TotalView og taka vinningin inn á telefoni síðuni, so er talan um tvær ymiskar søludeildir, ið geva tilboð hvør sær.

**FSE**

*Føroya Tele veitir umvegis Formula harumframt ein hóp av týðandi ERP skipanum og útgerð til vinnulívið, stovnar, kommunur og landið. Talan er um fíggjarstýringsloysnir, málsviðgerð, skjalahandfaring, lønar- skipan, umframt hýsing, netloysnir, telduútgerð, kopimaskinur og prentarar (Formula, 2017a). Síða 15 Fastnet hald - marknaður 1*

**Viðmerking**

hetta er ikki rætt, men leys uppáhald tí hesar vørur verða seldar leysar av hvørjum øðrum á hvør sínari søludeild á hvør sínum profittcentri í hvør sínum partafelag. Við tað at Føroya Tele ikki eigur allan eginpeningin í Formula og verður Formula tí fult og heilt rikið, sum sjálvstøðugt virkisøki. Vinningur ella aðrar tænastur til kundarnar vera ikki flutt ímillum feløgini, tí partarnir hava avtalað ein minniluta verja av hinum partaeigarunum í Formula og eyðsæð er at henda verður vird tí talan er umsjálvstøðuga leiðslu og starvsfólk á Formula.

Vit kundu hugsað okkum at fingið hesi uppáhald frá FSE útgreinað og skjalprógvað.

**FSE**

*Vertikal integratión ger, at Føroya Tele kontrollerar alla virðisketuna. Tað ger tað lætt at menna og marknaðarføra nýggjar tænastur, uttan at blanda aðrar veitarar uppí.*

**Viðmerkingar**

Føroya Tele Samskifti og Vodafone hava somu atgongdir til bæði IP neti og PSTN/ISDN neti og hava somu møguleikar at økja um virðisketuna á líka føti.

**FSE**

*higartil hevur ikki borið til at portera VoIP telefonnummur*

**Viðmerkingar**

Sum tað eisini verður víst á í hoyringsskrivinum, so ber til at portera IP nummur frá 1. Feb 2017 og er tað sera lætt at portera VoiP telefonummur og verður gjørt dagliga. Í flestu førum er heldur ikki neyðugt at skifta borðapparati út, tí hesi kunnu bæði nýtast til NetTala hjá Føroya Tele og Broadsoft loysnina hjá Vodafone.

**FSE**

*Føroya Tele hevur ynskt at halda hesa loysn fyri seg sjálva. Úrslitið er, at kundarnir sum nýta NetTalu og TotalView ikki hava møguleika at skifta televeitara, uttan samstundis at skifta frá verandi samvirkandi NetTalu og TotalView loysn.*

**Viðmerkingar**

Tað ber væl til at kombinera loysnina eins og aðalráðini hava gjørt. Her skal vísast á at øll aðaráðini í felag hava 2 NetTala hald frá Føroya Tele og øll fartelefon haldini frá Vodafone og eru hesar eisini fult knýttar saman við TotalView skipanina frá Formula. Skulu vit meta um hvussu stórur partur av samlaðu samskiftis útreiðslunum hjá ráðunum liggja ávikavist 99 % hjá Vodafone og 1 % hjá Føroya Tele. Okkum vitandi, eru aðalráðini væl nøgd við teirra loysn.

Út frá omanfyri standandi argumentum, er tað eyðsæð, at PSTN/ISDN/VoiP tænastur ikki skulu síggjast sum ein lokaður marknaður men er fult samantvinnaður við Fartelefon tænasturnar og VoiP tænastur frá útlendska marknaðinum so sum Microsoft. Við hesum, meta vit ikki at FSE kann staðfesta at Føroya Tele samtaki hevur RMS á fastnetinum.